FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 25. november 2019

J.Nr.: 19/00364

Svar upp á fyrispurning nr. 8/2019 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurning frá Rósu Samuelsen, løgtingskvinnu, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um MVG-endurrindan til hitapumpur.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv hava gjørt nýtslu av møguleikanum at fáa endurrindað MVG fyri uppseting av hitapumpum, síðan lógin kom í gildi, býtt upp á ár og økir í landinum?

2. Hvussu nógv er talan um í krónum, býtt upp á ár og økir í landinum?

3. Ber til at siga, at ferð er sett á at fáa fólk/ húsarhald at leggja um til hitapumpur, grundað á MVG-endurrindan?

4. Er landsstýrismaðurin sinnaður at leingja skipanina um MVG-endurrindan til el-riknar hitapumpuskipanir, sum gongur út 31.12.2019?

Svar til spurning 1:

Í 2017 vóru 26 umsóknir (Suðurstreymoy: 15 umsóknir, Norðurstreymoy: 2 umsóknir, Eysturoy: 5 umsóknir og Vágar: 4 umsóknir).

Í 2018 vóru 86 umsóknir (Suðurstreymoy 37 umsóknir, Norðurstreymoy: 14 umsóknir, Eysturoy: 16 umsóknir, Norðoyggjar: 10 umsóknir, Vágar: 7 umsóknir og Suðuroy: 2 umsóknir.

Í 2019 hava frá 1. januar til 1. oktober verið 89 umsóknir (Suðurstremoy: 45 umsóknir, Norðurstreymoy: 9 umsóknir, Eysturoy: 23 umsóknir, Norðoyggjar: 4 umsóknir og Vágar: 5 umsóknir.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Svar til spurning 2:

Í 2017: kr. 679.792

Suðurstreymoy: kr. 386.174

Norðurstreymoy: 43.569

Eysturoy: 153.034

Vágar: 97.015

Í 2018: kr. 2.378.022

Suðurstreymoy: kr. 983.118

Norðurstreymoy: kr. 285.055

Eysturoy: kr. 449.417

Norðoyggjar: kr. 290.628

Vágar: kr. 324.678

Suðuroy: kr. 45.126

Í 2019 hava frá 1. januar til 1. oktober: kr. 2.474.058

Suðurstreymoy: kr. 1.256.718

Norðurstreymoy: kr. 247.598

Eysturoy: 654.315

Norðoyggjar: 95.258

Vágar: 164.209 og

Suðuroy: 55.960

Svar til spurning 3 :

Tað er ringt at meta um. Talið á umsóknum fyri 2018 og 2019 er vaksandi.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Svar til spurning 4:

Landsstýrismaðurin arbeiðir við at leggja uppskot fyri Løgtingið, sum ber í sær, at skipanin við MVG-endurrindan verður longd í 1 ár.

Tinganes, 25. oktober 2019

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum